# Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Mimi Petrinu Olsen**, fødd Jacobsen, ættað úr Fuglafirði, fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi og heim í Christianskirkjuna mikukvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni hósdagin kl. 13.30.

**Jóhanna Joensen**, vanliga nevnd Hanna, Tórshavn ættað úr Haldórsvík andaðist mánadagin 88 ára gomul. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum mikukvøldið kl. 19. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin kl. 13. Tey ið vilja minnast Honnu kunnu lata eldrasambýlinum Oman Hoydalar eina peningagávu, konta í Føroya Banka.

**Hans Mohr Hansen, úr Miðvági** andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 83 ára gamal. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 17. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 14 úr Miðvágs kirkju. Tey ið vilja minnast Hans Mohr kunnu lata Miðvágs kirkju eina peningagávu.

**Jákup Johnsson Thomsen**
Fuglafirði

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin,
58 ára gamal.
Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum
hósdagin klokkan 17.00.
Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju
fríggjadagin klokkan 14.00.
Sungið verður úr Sálmabókini

*Familjunnar vegna*
**Marin**
**Bára, Mortan, Jonn og Marta**

Tey, ið ætla at minnast Jákup við blómum ella kransi, kunnu í staðin lata eina peningagávu til Leguhúsið í Nesvík, konta í peningastovnunum.

## Dagurin

**22. juli. Maria Magdalena.** Verður nevnd sum ein av teimum kvinnunum, sum vóru í fylgi við Jesusi og verður sett í samband við ymiskar kvinnur, sum vit annars hoyra um í evangelisku frásøgunum. Var ein av kvinnunum við Jesu grøv, tá ið hann var upprisin. Magdalena merkir úr bygdini Magdala.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta -útgáva 2008)*

# Viðmerking til Høgna Hoydal

Fyri tað fyrsta, so kunnu vit sum fjølmiðil ikki gera annað, enn at taka tøl, sum eru umbiðin og útflýggjað frá Fíggjarmálaráðnum, fyri góða vøru.

Er talan um misvísandi tøl, so er tað Fíggjarmálaráðið og ikki fjølmiðlarnir, sum hava ein trupulleika.

Í yvirlitinum, sum varð prentað í blaðnum, varð greitt tilskilað, at landsstýrisfólk í CHE-samgonguni ikki sótu alt árið. Men mynd varð sett av teimum, tí tey sótu størsta partin av árinum. Og tí mettu vit, at hesi áttu sín part í (meir)nýtsluni tað árið. Og tað sama varð gjørt í øðrum førum, har landsstýrissessur skifti eigara í álmanakkaárinum.

PS. Vit skulu viðganga, at eitt mistak var í greinini. Meirnýtslan, sum Bill Justinussen og Páll á Reynatúgvu standa til at hava í 2002, skuldu staðið í teiginum fyri 2003.

**-blaðstjórin**

# Skúlarnir svíkja

**BJØRGHILD DJURHUUS**
Heilsufrøðingur í Tórshavnar Komunuskúla

Sat og læs grein í Sosialinum, um tað stóra arbeiði sum Fólkaheilsuráði ger á Festivalum runt landið við at práta við ungfólk um kynslív og deila ókeypis hítir út.

Eg sum dagliga starvist sum Skúlaheilsufrøðingur gjørdist sera hugstoytt av, at lesa endan á greinini, har fýlst verður á upplýsinginga í skúlunum, at skúlarnir svíkja tey ungu.

At vit øll altíð kunnu gera tað betur, skal eg vera tann fyrsta til at ásannað, men at góðtaka póstandin um, at onki verður gjørt, vil eg púra afturvísa.

Vit eru heilsufrøðingar á nærum øllum skúlunum í Føroyum og veit eg, at allar hvør í sínum lagið leggja dent á júst henda málbólk. Vit raðfesta høgt at upplýsa og greiða frá øllum broytingum í tannáraverðini, kynslív og rusevnistrupuleikar, og alt sum hoyrir menningi til, frá barn til vaksin. Somuleiðis vil eg vísa á, at vit leggja dent á, at tað hevur stóran týdningin at tosa um kenslur og kenslulív við tann unga.

Leiklutur okkara innan skúlagátt gevur øllum næmingum møguleika fyri, at tann ungi til eina og hvørja tíð kann fáa fatur á okkum. Tað kann verða persónliga, ringja, smsa ella maila um eina tíð, uttan at skulla brúka óneyðuga tímar til tess. Og mínar royndir prógva, at tey ungu gera brúk av okkara tilboðið. Tey koma títt og ofta og vilja hava góð ráð ella bara venda eitthvørt sum liggur teimum uppá hjarta og órógvar.

Eg veit, at tað eru nógvir lærarar, ikki bara í mínum skúla, sum gera teirra til, at upplýsa og práta við tey ungu.og ofta í tættum samstarvi við okkum.

Kundi eisini gott hugsa mær at vita, hvar póstandurin um at skúlin svíkjur, stavar frá?

# Hvør eigur skommina

**ZACHARIAS BECH**
Porkeri

Tann síðsta dagin, fólkatingið var saman áðrenn summarfrítíðina, nevndi Edmund Joensen fólkatingslimur, í røðu síni møguleikan fyri at tiðna upp blokkstuulin, sum bleiv niðurfrystur frá 1. jan. 2002 at rokna, t.v.s. eftir at hann var skorin niður við 366 mio. kr.

Um hetta bleiv gjørt, hevði tað givið landskassanum eina meirinntøku uppá meira enn 100 mió. kr. og harvið minka um hallið á fíggjarlógini við somu upphædd, eisini fíggjarlóg, sum, um ikki viðurskiftini í samfelagnum broytast til tað betra, og tað sær tað ikki út til í løtuni, fer at hava eitt undirskot uppá útvið 1 mia. kr.

Av hesum, sum Edmund Joensen nevndi, stóðst nógv kjak. Frá tjóðveldismanninum, sum er sjálvskrivaður í fjølmiðlunum, tá nakað er á vási, fingu vit tann vanliga uppsangin um ikki at taka ímóti donskum peningi, um at taka ábyrgd av okkum sjálvum (sjálvt um eg eri farin at ivast í um hann veit hvønn týdning orðið áyrgd hevur).

Úr egnum flokki fekk Edmund Joensen eisini ábreiðslur fyri at arbeiða í sjálvdrátti.

Samdur ella ikki, so er hetta ein møguleiki fyri at fáa landskassan nakrar eyka inntøkur, nakað sum hann harðliga hevur brúk fyri.

Eisini hevði hetta havt almiklan týdning av tú at hesin peningur komið uttan eftir inn í tað føroyska samfelagið.

Í hvussu so er, so havi eg ikki hoyrt, hvørki frá samgongu um, hvussu vit kunnu økja um inntøkurnar uttan eftir inn í samfelagið.

Tað frættist, at samgongan atbeiðir við at leggja meira avgjald og skatt á borgaran, fyri at útvega landskassanum meira pening. Mín metan er, at hetta er bara ein panikloysn, og er at líkna saman við eitt húsarhald, sum er komið í fíggjarligar trupulleikar, har maðurin fer í sparibuksurnar hjá børnunum, ístaðin fyri at royna at skaffa eyka innt. kur til húsarhaldið.

Fíggjarlógin, sum vit liva undir, hevur eitt risastórt undirskot. Hon bleiv samtykt beint fyri nýggjár.

Seinasta summar lá ein stórur partur av okkara fiskiflota orsaka av teimum høgu oljuprísunum.

Seinasta heyst fall prísurin fyri tey dýru fiskasløgini niður í eina helvt, tí tey lond, sum keypa okkara fiskavørur, vóru rakt av heimskreppuni, og tí ikki høvdu ráð at gjalda nóg mikið fyri tann dýra fiskin. Úrsliti var, at tey virkið sum høvdu t.d. keypt tosk fyri tann høga prísin, máttu til seinast selja ta lidnu vøruna við stórum halli.

Áttu landstýrið og fíggjarnevnd ikki at tikið hædd fyri teimum avleiðingum, sum hetta hevði við sær.

Var tað tí at teir trúðu blint uppá tað, sum okkara frøðingar, hesir somu fáu, sum hvørja ferð, tá talan er um fíggjarviðurskifti, vera bidnir um at gera sínar metingar.

Metingar, sum í nógvum førum hava verið so skeivar, at sjálvt tann vanligi maðurin á gøtuni, hesum, sum dugir lítlutabell og nakað afturat, hevur ógvast við.

Tí hvørjum livir okkara samfelag av?

Er tað ikki eins og við einum vanligum húsarhaldi, sum einans livir av tí peningi, sum verður tjentur inn í húsarhaldið. Vit síggja jú, at øll royna at økja um sínar inntøkur fyri at fáa eitt høgri livistøði.

Tá inntøkan av útfluttum fiskavørum fellur, nakað sum er ávirkað uttaneftir, og ríkisveitingin verður skerd, nakað sum er sjálvsagt, tá sigur tað seg sjálvt, at færri peningur er at fara í umfar í samfelagnum. Hetta fer sjálvsagt at merkjast í øllum liðum.

Fremstu fíggjarfrøðingar í landinum mettu at heimskreppan fór ikki at taka okkum.

Tá tey londini, sum keypa okkara fiskavørur blivið rakt av kreppuni, og tí ikki høvdu ráð at gjalda nóg mikið fyri tað, sum sum tey keyptu, tá meti eg at kreppan gott og væl er komin til okkara.

Tásitandi landsstýrið skerdi blokkin við 366 mió. kr. árliga.

Fyri at rættvísgera hetta søgdu teir seg vilja menna vinnulívið til tess at viga upp ímóti niðurskurðinum.

Vit vita, at tað megnaðu teir ikki.

At so somu flokkarnir tey eftirfylgjandi árini kunnu vísa á, at sjálvt um blokkurin var minkaður, so gekk tað fíggjarliga væl í Føroyum, hvør skal siga at hesin hevði ikki tann týdning, sum sambandsflokkurin vildi vera við, er ein onnur søga.

Bankarnir hava í fleiri ár pumpa útlendsk tikin lán inn í føroyska samfelagið. Ein stórur partur av hesum peningi er endaður í landskassanum sum skattur og avgjøld, tí tey hava skapað nógv virksemi og økt um keypiorkuna. Hetta kann ikki roknast sum sjálvberandi búskapur, tí hetta er lántur pengar, sum skulu gjaldast aftur við rentu.

So er spurningurin um hesi lán kasta so nógv av sær, at tey kunnu gjaldast aftur við rentu. Hava tey ikki tað, og tað er nógv sum týðir uppá at tey ikki hava gjørt, so drena tey onnur virðir út úr samfelagnum, virðir, sum ikki eru skapað av áðurnevndu lánum.

Nú tá lánimøguleikarnir hjá okkum eru skerdir, sita vit eftir við einari fíggjarligari pínu, sum fyrst og fremst er ein fylgja av at blokkurin í sínari tíð var skerdur.

Tá blokkstuðulin í góðum tjóðveldisanda verður roknaður sum virði í samfelagnum verður hann roknaður sum % av BTÚ. Hetta gevur eitt forholdsvís lágt prosenttal í mun til um hann bleiv roknaður sum % av fíggjarlógini, sum er tað rætta. Einasta, sum blokkstuðulin hevur við BTÚ at gera er, at hann saman við øðrum veitingum úr Danmark, sum liggja uttanfyri blokkin, umleið 1 mia. íalt, økir um okkara BTÚ við umleið 3 mia.

Tá tjóðveldisflokkurin fekk annan limin í fólkatinginum segði hesin, at hann fór at lata helvtina av lønini til flokkin.

Hví heldur tjóðveldi, at tað er rætt at fíggja flokkin við donskum peningi, meðan tað er ábygdarleyst at fíggja føroyska heilsuverkið við stuðli úr Danmark.

Edmund Joensen kom við uppskoti um at tiðna blokkin, so vit harvið kundu fáa eina meir inntøku uppá 100 mió.

Skomm, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Skomm ella ikki, so er tað ikki serligu álitisvekjandi fyri ein fíggjarmálaráðharra at koma út við einari fíggjarlóg við einum undirskoti, sum svarar til 15.000 kr. fyri hvønn íbúgva í Føroyum.